# Felagið Sinnisbati

Árligur aðalfundur verður, í Miðlahúsinum

Leygardagin tann 17.Marts. 2007. kl 15:00

Vit seta fokus á aðalevni: **Avarðandi**.

Sálarfrøðingur Heri Kragesten, heldur fyrilestur um **»Tá verðuleikin tekur teg av fótum«**

Aftaná framløguna verður kaffi, spurningar/kjak,

**Aðalfundurin byrjar sambart viðtøkurnar hjá SINNISBATA:**

1. Val av orðstýrara
2. Ársfrágreiðing formansins
3. Grannskoðaðan roknskap fyri seinasta rakstrarár felagsins
4. Møguligar lógarbroytingar
5. Limagjald fyri komandi ár
6. Nevndarvæl
7. Val av grannskoðara
8. Ymiskt

Vælkomin á aðalfundin.

**Nevndin**

*Soffi Egholm, formaður*

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

# Suðuroyar Tjóðveldisfelag

Aðalfundurin verður í Naddoddaneystinum á Tvøroyri sunnudagin 18. mars 2007 kl: 17:30

**Skrá:**

- Nevndarval v.m.
- Uppstilling
- Aktuel mál

Møtið fjølment

***Nevndin***

# KOYRIKORT:

Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 19. mars 2007

Skjót avgreiðsla

KOYRISKÚLIN
**HJÁ MARNAR ANDREASEN**
TEL 314 381 · FARTEL 214 381

# Fíggjarleiðari

**Søkt verður eftir fíggjarleiðara til Føroya Stiftsstjórn at taka við starvi 1. mai ella so skjótt til ber.**

Føroya Stiftsstjórn umsitur ávís viðurskifti í fólkakirkjuni so sum kirkjuligar lógir, prestagarðar, og arbeiðsviðurskifti hjá prestunum. Stiftsstjórnin umsitur eisini Føroya Kirkjugrunn, sum løgtingið játtar pening til á fíggjarlógini. Bispur er ovasti kirkjuligi myndugleiki í Føroyum, hvat prestum og kirkjuráðum viðvíkur, og hevur umsjón við teimum.

Fíggjarleiðarin hevur høvuðsábyrgdina av roknskapinum, bókhaldinum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá stiftsstjórnini og kirkjugrunninum.

**Uppgávurnar eru m.a. hesar:**

- Fíggjarætlan og fíggjarstýring
- Prestalønir og skrivstovulønir
- EDV-kervið
- Góðkenning av fíggjarætlanunum hjá kirkjuráðunum
- Ávísing av útgjøldum av kirkjuskattinum

Umframt deildarleiðaran arbeiða 2 fólk parttíð í bókhaldinum.

Bókhaldsskipanin hjá stiftsstjórnini er netbaserað – EDV skipan CONCORDE C5. Skrivstovan hevur elektroniska journalskipan.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góðan kunnleika til EDV og til føroyskt mál og stavseting.

Starvið verður lønt sambært StK-felagssáttmálanum og felagssáttmála fyri skrivstovufólk í statinum. Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna, men kann møguliga gerast longri, eftir at fólkakirkjan er yvirtikin sum føroyskt málsøki.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um starvsroyndir, avritum av prógvum og viðmælum verður send Føroya Stiftsstjórn, J. Patursonargøta 20, postrúm 8, 110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er mánadagin 28. mars 2007 kl. 12.00. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Margrit Debess, deildarleiðara, telefon 31 19 95.

**Føroya Stiftsstjórn**
J. Paturssonargøta 20
Postrúm 12
FO- 110 Tórshavn



# Til sølu

Motorsúkkla til sølu fyri 58.000 kr. Koyrt 120 km. Motorur: 647 ccm DOHC 90 V2,8 ventilar, vatnkøld. HK: 79+ er tuna.

**Tlf 50 55 50**

TVØROYRAR KOMMUNA

## Suðuroyar Barnaverndartænasta

www.tvoroyri.fo · susanne@tvoroyri.fo · tlf. 371085
fax 371814 · postboks 80 · FO-800 Tvøroyri

## SOSIALRÁÐGEVI/MÁLSVIÐGERI

TIL BARNAVERNDARTÆNASTUNA Í SUÐUROY AT SETA SKJÓTAST GJØRLIGT

Kundi tú hugsað tær at virka og arbeitt fyri, at børn og ung í Suðuroy fáa tryggleika, umsorgan og ein tryggan uppvøkstur? So átti tú tá at umhugsa at søkt arbeiði á Barnaverndartænastuni í Suðuroy.

Á barnaverndartænastuni í Suðuroy hava vit brúk fyri fólki í eitt fulltíðarstarv og eitt hálvtíðarstarv (20-25 t/v), sum skal hjálpa okkum at bøta um umstøður og kor hjá teimum, sum ikki hava nóg mennandi og tryggan barn- og ungdóm.

Barnaverndartænastan sum bjóðar tænastu til borgarar í øllum kommunum í Suðuroy, húsast í løtuni í býráðshúsinum á Tvøroyri har 2 fólk arbeiða. Arbeiði, sum er ógvuliga fjølbroytt umfatar m.a. heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við og ráðgeva stuðlar, sum skulu hjálpa og menna barnið í og uttanfyri heimið. Í arbeiðinum fert tú eisini at samstarva við nógvar fakbólkar m.a. innan námsfrøði, sálarfrøði og innan undirvísingarøki. Tú kemur at taka tær av nógvum ymiskum barnaverndarmálum – gomlum sum nýggjum - og virkisøkið okkara verður innan karmarnar av barnaverndarlógini.

**Vit vænta av tær:**

- at tú hevur hóskandi útbúgving (t.d. sosialráðgevi, pedagog, lærari, sjukrasystur el.líkn.)
- at tú ert fleksibul og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálvstøðug/ur í arbeiði tínum
- at tú hevur gott innlit og evnar at síggja álvaran í teimum málum tú arbeiðir við
- at tú ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi

Innlit í og royndir frá barnaverndararbeiði/arbeiði við børn og/ella familjuráðgeving kann vera ein fyrimunur, men er ikki eitt krav.

Tann sum verður settur, fær møguleika at fáa ta útbúgving/eftirútbúgving íð skal til.

**Vit kunnu bjóða tær:**

- eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði
- møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar
- møguleika fyri flekstíð og fyri sjálvtøðugari at tilrættisleggja tínar arbeiðstíðir
- Skiftandi arbeiðstíðir kann koma fyri.

Setanarviðurskifti eftir sáttmála við avvarandi fakfelag.

Meira fæst at vita frá Susanne Madsen á tlf: 371085 ella teldupost: susanne@tvoroyri.fo

Umsókn við relevantum prógvum kunnu sendast til

**Suðuroyar Barnaverndartænasta**
Tvøroyrar Kommuna
Postboks 80
FO 800 Tvøroyri
Mrk.: starv barnaverndarumsitingin.

Freistin at søkja er: fríggjadagin t. 23/3-07.